# Settu trygdina hjá Strandferðsluni til viks

**– Verður tað neyðugt, fer Strandferðslan at biðja politiið hjálpa sær at forða fyri, at trygdarreglarnar verða brotnar**

TRYGDAR-VIÐURSKIFTI
*Áki Bertholdsen*



*Strandferðslan hevur nú forðað fyri meiri ólógligum flutningi av bensini og dieselolju við skipum sínum*

Tá ið fólk ferðast úr oyggj í oyggj við skipunum hjá Strandferðsluni at fylla sær bensin og diesel upp í dunkar, bróta tey trygdarreglarnar hjá Strandferðsluni.

Tí hevur Strandferðslan nú steðgað hesum flutningi.

Sandur hevur verið at kalla einasta staðið í landinum, har bensin og diesel hevur verið at fingið og tað hevur fingið fólk úr øllum meginøkinum á pílagrímsferð til gloymdu oynna at fylla sær tangarnar.

Hetta hevur ført til, at flutningurin ímillum Skopun og Gomlurætt hevur sett met hesar seinastu dagarnar.

Sunnudagin flutti Ternan sostatt 219 bilar og 795 ferðafólk flutt um Skopunarfjørð og tað er met. Mánadagin var eisini nógvur flutningur, tí tá vóru 195 bilar fluttir um Skopunarfjørð.

Og sum tað sást í Degi og Viku mánakvøldið, var tað ikki hissini, sum fólk hamstraðu av bensini og diesel.

Fleiri fyltu upp í dunkar og onkur enntá upp í tunnur at hava við sær inn á meginlandið aftur.

### Ólógligt

Men hesin flutningur er ólógligur.

Eftir IMDC- reglunum, sum eru altjóða reglar fyri vandamiklum flutningi við skipum, er tað bara loyvi at flyta ein litur av bensini og fimm litrar av diesel í dunkum við ferðamannaskipum.

Samstundis upplýsir Brandstøðin, at tað verða eisini serlig krøv sett til dunkarnar.

Sostatt hava tey, sum hava flutt bensin og diesel í dunkum um Skopunarfjørð hesar dagarnar, næstan uttan undantak sett trygdarreglarnar hjá Strandferðsluni til viks.

Men Strandferðslan hevur nú steðgað hesum flutningi.

Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at skiparin á Ternuni tók sjálvur stig til at steðga flutninginum í gjáramorgunin.

– Tá ið fólk koma umborð á Gomlurætt, verða tey gjørd varug við, at tað ikki er loyvt at hava meiri enn ein litur av bensini og fimm litrar av diesel í dunkum.

– Og tey, sum koma umborð í Skopun, verða spurd um tey hava bensin ella diesel við sær í dunkum.

Johan Isholm á Strandferðsluni, sum hevur við trygdarviðurskiftini at gera, sigur, at hinvegin hevur manningin hjá Strandferðsluni ikki loyvi til at kanna bilarnar.

– Men vit vóna, at fólk eru so mikið at sær komin, at tey ikki seta trygdina til viks, sigur hann.

Hinvegin siga bæði hann og Kristian Davidsen, at tað er ein uppgáva hjá løgregluni at kanna eftir um ólógligur flutningur fer fram.

– Men fær manningin hjá Strandferðsluni illgruna um, at fólk hava dunkar við sær, verður tað meldað til løgregluna, sum síðani kannar málið.

–Vit seta trygdina ógvuliga høgt og hava vit illgruna um, at trygdarreglarnar verða brotnar, fara vit at biðja løgregluna hjálpa okkum, sigur Kristian Davidsen.

# Gera útibarnagarð á Tvøroyri

**Pláss verður fyri 24 børnum og barnagarðurin skal halda til í hølum í skúlabygninginum**

BARNAANSING
*Áki Bertholdsen*



*Í august i ár letur útibarnagarður upp í Tvøroyri við plássi fyri 24 børnum*

**Tvøroyri:** Nú fáa tvørafólk eisini útibarnagarð.

Ein meiriluti av Tvøroyrar býráði samtykti mánakvøldið at gera útibarnagarð á Tvøroyri og hann fer at taka børn inn longu 1. august.

Pláss verður fyri 24 børnum í útibarnagarðinum, sum skal hava støð í hølunum í skúlabygninginum á Tvøroyri, har Nautilus hevur verið.

Men áðrenn hølini kunnu takast í nýtslu til útibarnagarð, skulu tey umvælast fyri einar 70.000 krónur.

Á býráðsfundinum kom fram, at tørvurin á barnaansing er nøktaður á Tvøroyri.

Men tað standa eini 40 børn á bíðilista eftir at sleppa í barnagarð og orsøkin til tað er, at tað eru so nógv, sum vilja sleppa úr kommunalu dagrøktini í barnagarð.

Ætlanin er so at taka nøkur av teimum eldru børnunum í útibarnagarðin so at pláss verður fyri fleiri vøggustovubørnum í sjálvum barnagarðinum, tí nógv av teimum, sum standa á bíðilista eru vøggustovubørn.

Av tí, at talið á børnum í dagrøktini fer at minka, tá ið útibarnagarðurin letur upp, fer tað bara at kosta kommununi 10.000-12.000 krónur um mánaðin eyka at skipa útibarnagarðin.

### Fýra ímóti trimum

Men býráðið var ikki samt um at útibarnagarðurin skal gerast.

Finnleif Guttesen úr Sambandsflokkinum helt ikki, at kommunan átti at brúka pening til at ganga nøkrum serligum ynskjum á møti, tá ið tørvurin á barnaansing er nøktaður, samstundis sum alt annað liggur á láni í kommununi. Hann vísti eisini á, at tað fór at gera, at dagrøktarmammur misti bæði arbeiði og inntøku.

Sverri Midjord úr Javnaðarflokkinum dugdi ikki at skilja, hví barnaansing skuldi verða ein almenn uppgáva, tí tað var tað ikki fyrr, tá ið nógv meiri arbeiði var á Tvøroyri og tað hevði gingið fínt.

Pauli Einarsson legði dent á, at hann tók undir við einum útibarnagarði, men hann tók ikki undir við, at akkurát skuldi fáa hølini, sum Nautilus hevði verið í.

Honum dámdi ikki, at eitt øki, sum varð gjørt til ítróttarøkið alsamt meiri og meiri varð tikið til barnaansing. Hann mælti ístaðin til at leggja eina heildarætlan fyri økið ístaðin fyri at taka eina avgerð nú.

Men hinir fýra býráðslimirnir, Bergur Bærendsen, Dan Nielsen, Heri Mortensen og Kristin Michelsen atkvøddu fyri at gera útibarnagarð í hølunum hjá Nautilus og sostatt varð málið samtykt.



# Endurtøka er lykilin til positivar tankar

**Bæði arbeiðsumhvørvið og privata lívið verður betri við positvari hugsan, sigur Carsten Sommerskov, sum í farna viku savnaði føroyingar í hópatal um positivar tankar**

POSITIVT
*Heri á Rógvi*



*Carsten Sommerskov*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

"Hyggi runt í rúminum við brillunum hjá einum reingerðarfólki; hygg síðani runt í rúminum við brillunum hjá innrættingararkiteki. Og til síðst hyggi tit so runt í hesum rúminum og hugsi tykkum, at tit skuldu selt innbúgvið á einari uppboðssølu."

Soleiðis byrjaði Carsten Sommerskov skeiðið hjá sær á Hotel Føroyum síðsta fríggjakvøld.

Hendan venjingin hevði til endamáls at vísa, hvussu fólk hugsaðu. Síggja fólk møguleikar ella trupulleikar – positivir ella negativir tankar.

Fólk, sum eru positiv, liva bæði betri og longri enn teirra negativu medmenniskju. Tískil kann gott loysa seg at gerast meira positivur. Ja, hetta gevur heilt einfalt betri lívsgóðsku.

Hetta er boðskapurin hjá Carsten Sommerskov. Hann er 52 ára gamal og býr í einari lítlari bygd á Sælandi. Hann hevur sett á stovn og er stjóri fyri fyritøkuna Vækst, sum arbeiðir við skeiðum sum hesum í at fáa fólk at hugsa positivt og at læra fyritøkur og privat persónar at fáa meira burturúr dagligdegnum.

Upprunaliga er hann útbúgvin sjúkrasystir í teimum døgum, tá hetta starv kallaðist sjúkrasystir. Har arbeiddi hann saman við krabbameinssjúklingum, sum skuldu doyggja. Her byrjaði at fáast við mentala venjing, og tað gjørdist so byrjanin til hansara komandi livibreyð. Tað byrjaði í smáum í 1979, og síðani 1988 hevur hetta verið fulltíðarstarv.

– Í dag brúki so at siga einki av tí, eg lærdi sum sjúkrasystir. Eg nýti tað, eg havi lært so við og við, sigur Carsten Sommerskov, sum eisini hevur verið á einum ótal av skeiðum sjálvur.

– Eg velji bert at fara til tey bestu av teimum bestu skeiðunum, sigur Carsten Sommerskov.

Á hesum skeiðum halda menn sum Al Gore fyrilestrar.

### Góð undirtøka

Í Føroyum er eingin Al Gore, men Carsten Sommerskov hevur hildið skeið fyri nógvum fólkum í Føroyum.

Hann letur væl at undirtøkuni í Føroyum. Hetta, við at halda fyrilestrar fyri nógvum fólkum, er ikki nakað nýtt fyri Carsten. Umframt at halda skeið fyri og arbeiða saman við stórum donskum fyritøkum, so nýtir hann oftani styttri skeið sum hetta fríggjakvøldið.

– Í oktober havi eg leigað Cirkusbygningen í Keypmannahavn, har pláss er fyri einum 1.500 fólkum.

Vit eru ikki 1.500 á Hotel Føroyum fríggjakvøldið, men eini 150 fólk vóru komin saman.

Og maðurin dugdi at fáast við fólk. Fyrst í umleið hálvfems minuttir tosaði hann út í eitt. Hann undirhelt og rúnarbant ein stóran part av áhoyrarunum. Ikki tí. Onkur stakk av í steðginum.

Og fólkið var rættiliga undirhildið. Láturin rungaði stundum, og fólk vóru skjótt út fyri at ogna sær bøkur og fløgur, sum Carsten hevur givið út í hópatal við positiva boðskapinum.

Retorikkurin hjá Carsten er imporandi, og hansara teknikkir og teori ógvuliga einfaldar. Og kanska hetta fær onkran at hugsa positivari. Summi hildið hetta vera júst tað, men onnur hildu talan vera um nakað fjas, sum ein og hvør kann siga sær sjálvum.

Tríggjar tímar langa skeiðið hjá Carsten Sommerskov fríggjakvøldið var í tveimum pørtum. Eftir steðgin snúði tað seg um, hvussu hetta við positivari tilveruna kann fáast at virka við ymsum metodum og venjingum.

Og sambært Carsten er uppskriftin til positivari tankar og positivari lív einføld.

– Endurtøkan er lykilin. Tað sær kanska ikki altíð so vakurt út, men tað er neyðugt at gera tað umaftur og umaftur, sigur Carsten. Og fyri teimum mongu áhoyrarunum fríggjakvøldið sigur hann:

– Dette er mental træning, og det virker.

# 70% av lønini í verkfalspengum

**Fólk í verkfallið siga seg missa túsund krónur um vikuna**

VERKFALL
*Heri á Rógvi*

Fleiri fólk í verkfalli, sum Sosialurin hevur tosað við, siga, at tey hava fingið at vita, at tey fáa 70% í verkfalspeningi.

Hesi tíðindi eru kortini ikki váttaði. Vit hava roynt at fáa tað váttað hjá arbeiðarafeløgunum, men tað einans svarið, vit hava fingið, er "eingin viðmerking".

Rokna vit eitt sindur við tølunum, so vísir tað, at ein persónur í verkfalli fær umleið 2.600 kr. um vikuna í løn.

Hesum skulu tey eisini gjalda skatt av, verður upplýst hjá Havnar Arbeiðsmannafelag.

Tímalønin er 92,2 kr. og 92,52 fyri "skitið" arbeiði. Roknað við við tí lægra talinum, so er ein vanlig vika, t.e. 40 tímar, verd 3.688 kr. Affurat hesum kemur frítíðarløn áljóðandi 442,56 kr ella tólv prosent. Tað hevur ikki eydnast okkum fyri vist at fáa upplýst, um fólk fáa frítíðarløn, meðan tey eru í verkfalli.

Tað er sjálvsagt ymiskt, hvat fólk forvinna, tá hugsað verður um yvirtíð og annað, men útfrá okkara útrokningum er minsta inntøkan túsund krónur um vikuna í vanligari løn.



*Neyðugt er eisini at vera til arbeiðis, tá tað er verkfall – sum vaktir. Men lønin er ikki líka góð sum vanligu arbeiðsdagarnir*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Sverri í nevnd

Forsætisráðharrin og landsstýrisformaðurin í Grønlandi hava í felag sett eina nevnd, sum skal arbeiða við, hvussu grønlendska vinnulívið á bestan hátt kann mennast. Nevndin telir átta limir. Ein teirra er Sverri Hansen.

Sverri er leirvíkingur, og hann er mest kendur fyri tíðina, hann var formaður fyri Framtaksgrunnin undir kreppuárunum í Føroyum. Sverri er til dagligt stjóri fyri Útnorðurgrunnin.

Nevndin skal vera liðug við sítt tilmæli 1. november í ár, og ætlanin er, at arbeiðið skal nýtast í sambandi við samráðingarnar millum grønlendingar og danir um blokkstuðulin eftir 2004, upplýsir Statsministeriet í tíðindaskrivi.

**-hr**



*Fyrrverandi formaðurin fyri Framtaksgrunnin er vorðin limur í eini nevnd, sum skal gera eitt tilmæli um grønlendska vinnulívið í framtíðini*